## Kári heldur fram sum formaður

Ársfundurin hjá Sjálvstýrisflokkinum samtykti í gjár, at Kári P. Højgaard skal halda fram sum formaður floksins, men hin Kári – við á Rógvi sum eftirnavni – avloysir Eyðun Elttør sum næstformaður. Til ársfundin hevði Kári á Rógvi sent skriv inn, har hann heitti á ársfundin um at velja Kára P. Højgaard at halda fram sum formaður floksins. Í skrivinum vísti hann á ta positivu gongd, sum tað hevur eydnast Kára P. Højgaard at skapa fyri flokkin.



## Sjálvstýrið nýggja landsnevnd

Á ársaðalfundinum leygardagin valdi Sjálvstýrisflokkurin nýggja landsnevnd. Í nevndini eru Kári á Rógvi, løgtingsmaður, Kristina Toftegaard Larsen, innstillað av Eysturoyar valfelag, Eileen Sandá, vald av landsnevndini, Jákup Sverri Kass, innstillaður av Unga Sjálvstýrinum, Heðin D. Poulsen, innstillaður av Suðurstreymoyar valfelag, Karl Olsen, innstillaður av Norðstreymoyar valfelag, Jan Joensen, innstillaður av Norðoya valfelag og Kári P. Højgaard, løgtingsmaður. Nevndin skipar seg sjálv.Løgtingslimirnir hava atgongd til landsfundirnar, har teir hava talurætt, men ikki atkvøðurætt. Floksformaðurin hevur vetorætt í principiellum politiskum málum.

## Drepið dreparasniglarnar

**Dorete Bloch heldur at allir føroyingar eiga at fara í hernað móti morsniglinum alt fyri eitt**

NÁTTÚRA

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Dorete Bloch, leiðari á djórasavninum hjá Umhvørvisstovuni, mælir fólki, ið koma fram á morsnigil, um at týna hann alt fyri eitt.

Tann fyrsti morsnigilin í ár varð sæddur 5. mars. Men síðan hevur verið so mikið kalt í veðrinum, at ikki fyrr enn nú fyrst í apríl eru fleiri at síggja.

Til tess at halda talinum niðri og helst týna allan stovnin, eiga vit at fara undir at beina fyri sniglinum frá teirri løtu, teir fyrstu smáu ikkikynsbúnu sniglarnir koma fram. Tí at verða teir makingarførir, kann talið á teimum koma upp í eina milliión eftir einum summari, um einki verður gjørt beinanvegin.

Skal bardagin móti morsniglinum, ella dreparasniglilin, muna, eigur alt grannalagið at fylkjast og beina fyri honum.

Ráðini frá Doretu Bloch til at basa sniglinum eru millum annað:

Brúkið sniglafellu, egnið við keks, øli ella súreplaflusi, leggið út snigla-eitur, jarnsulfat [Fe2(SO4)3], ið ikki er eitrandi fyri fugl ella hópast upp í natúruni, ella takið teir allar upp og koyrið teir í kókandi vatn.

# Fólk skulu keypa meira umhvørvisvinarligt

**Unga Sjálvstýri mælir til, at ítøkilig stig verða tikin til at ávirka keypsvanarnar hjá fólki, so tey velja umhvørvisvinarligar vørur**

POLITIKKUR

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Á ársfundinum hjá Sjálvstýrisflokkinum leygardagin segði formaðurin hjá Unga Sjálvstýrinum, Jógvan Skorheim, í framløgu sínari, at hóast flokkurin ikki er í samgongu, eigur hann at gera alt fyri, at næsta ættarliðið í Føroyum fær eina framtíð, ið er rein og umhvørvisvinarlig.

- Tak MVG'ið av øllum vørum, ið eru merktar við Ø merkinum, Blómuni ella Svananum. Hetta fer at birta uppundir áhugan hjá fólki at velja hesar vørur framum aðrar vørur, ið eru skaðiligar fyri umhvørvið og okkara heilsu, segði formaðurin. Og hann vísti á, at vit á hendan hátt kunnu vera við til at geva okkara íkast til ein reinari heim.

- Og tað skylda vit ikki bara okkara grannum ella heiminum, men eisini okkara næsta ættarliði. Hesi skulu eisini uppliva grønu náttúruna, reina sjógvin ella smakkin av gomlum havhesti, sum aftur kann etast, uttan at verða fyltur av eitran, segði Jógvan Skorheim, millum annað, í røðu sínari.



*Eini 30 fólk møttu upp á landsfundinum hjá Sjálvstýrisflokkinum leygardagin*

*Mynd: Rigmor Dam*

## Gransking um strongd

Føroysk granskingarúrslit skulu leggjast fram á stórari altjóða ráðstevnu í Amsterdam í apríl.

Tað snýr seg um úrslitini frá kanning av 8. floks næmingum í 2006, sum Tóra Petersen, sálarfrøðingur gjørdi saman við Esk Elklit og J.G. Olesen. Kanningin snúði seg um PTSD (Post Traumatic Stress Disorder) ella strongd hjá ungfólki í Føroyum, sæð í mun til lívshendingar hjá hesum.

Úrslitini av kanningini vóru løgd fram her í Føroyum á nøkrum fundum seinasta heyst, og vóru rættuliga áhugaverd. Nú verða tey løgd fram á altjóða ráðstevnu í Amsterdam 17. – 19. apríl, sum EUROPEAN SOCIETY FOR TRAUMA AND DISSOCIATION skipar fyri, sigur Granskingarráðið.

**rd**

## Yvirteknað pílagrímsferð

Longu eitt samdøgur eftir at Sosialurin skrivaði um ætlanina at skipa fyri føroyskari pílagrímsferð hava 55 fólk teknað seg. So nú mugu tvær pílgrímsferðir skipast

Tað eru danski presturin Kristine Hestbech og føroyska Randi Meitil, studentaskúlalærari, sum hava tikið stig til eina pílagrímsferð síðsta vikuskiftið í mai. Upprunaliga var ætlanin at seta mark fyri 25-30 luttakarar. Men bert eitt samdøgur eftir at blaðið kom á gøtuna við søguni, hava heili 55 fólk longu teknað seg.

- Hetta er sera spennandi, og fólk eru vælkomin at tekna seg, enn, tí so kunnu vit umhugsa at skipa fyri fleiri túrum, sigur Kristine Hestbech, sum í øllum førum roknar við, at tær fara at skipa fyri tveimum pílagrímsferðum, so øll 55 sleppa við.

# Útlendskir makar skjótari arbeiðsloyvi

FUNDARSAMTYKT

Útlendingar, giftir føroyingum, skulu skjótari fáa arbeiðsloyvi í Føroyum. Hægri lestur skal uppraðfestast og føroysk rættarskipan skal skipast. Hesi vóru nøkur av málunum, sum ársfundurin hjá Sjálvstýrisflokkinum samtykti leygardagin

**Samtyktin er soljóðandi:**

Landsfundurin fegnast um tað avbera góða valúrslitið og stóru tilgongdina av nýggjum virknum limum. Eisini tekur fundurin undir við tí politikki, tingbólkurin hevur ført higartil.

Sjálvstýrisflokkurin ásannar at alneyðugt er at Føroyar samtykkja og fremja ST-sáttmálan um rættindi teirra ið bera brek. Neyðugt er at tryggja ráðgeving og eftirlit við, at sáttmálin verður hildin.

Landsfundurin tekur undir við, at tingbólkurin roynir at fáa semju í lag við landsstýrissamgonguna um ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk.

Eisini fegnast fundurin um royndirnar at skapa breiðar semjur á tingi um týðandi mál. Serliga má breið semja fáast um langtíðar og burðardyggan fiskivinnupolitikk.

Tað er av stórum týðningi at taka umhvørvis viðurskiftini í álvara. Átøk skulu fremjast til tess at minka dálkandi útlát. Umhvørvisvinarligar reinar orkukeldur, so sum vindur, vatn, sól og aldu orka skulu mennast.

Útlendingaøkið má skipast av nýggjum, so Føroyar fáa neyðuga tilgongd av arbeiðsmegi. Útlendingar giftir við føroyingum, skulu fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvið, tá umsókn um familjusamanføring verður latin inn.

Heitt verður á samgonguna um at raðfesta hægri lestur og at samtykkja uppskotini um rættarskipan og javnstøðu.

Loksins harmast landsfundurin, at ikki størri stig verða tikin á sjálvstýris- og framburðsleið.